# Summarkapping 2008

LÝSINGARTILFAR


## Sosialurin á ferð

### BILLUND - barnabýur burturav

Í góðveðrinum á hvítusunnu var Sosialurin fimm dagar í Billund, har vit við barnabrillum og foreldraeygum upplivdu heimskendа legobýin. Fyrstu dagarnar gistu vit á Hotel Legoland og seinni á Hotel Propellen, sum er beint við. Heimanífrá leigaðu vit bil frá 62° N, sum stóð klárur á flogvøllinum í Billund. Ein dag koyrdu vit 20 minuttir norðureftir til Givskud Zoo, og ein annan dag tveir tímar suðureftir til Danfoss Universe á oynni Als. Men alt hetta kunnu tit lesa meira um hesa vikuna í Summarkappingini, har leiðin gongur til Billund.

# Billund – brúgvin inn á meginlandið

Vit føroyingar kunnu tað sama venja okkum við allar ferðamøguleikarnar, sum eru at finna á og úr flogvøllinum í Billund. Seinastu árini eru alt fleiri flogfeløg farin at flúgva um hendan næststørsta flogvøllin í Danmark. Flogvøllurin í Billund er rúmligur, ljósur og lættur at finna runt í. Hann er nýliga umvældur og nútímansgjørdur, so hann stendur ikki aftanfyri teir størstu flogvøllirnar í Norðurlondum. Har er millum annað ein stórur handil við tollfríum vørum, fleiri klædna- og gávuhandlar, bilútleigan og ferðaskrivstovur, sum selja ferðir til útlandið.

Tey, sum ferðast ofta, til dømis í arbeiðsørindum, kunnu brúka bíðitíðina í King Amlet Lounge, sum er eitt stórt og stílfult bíðirúm á aðru hædd. Har eru altjóða bløð og tíðarrit til láns, teldur íbundnar Internetið, telefon, fax og kopimaskinur, fundarhøli, okkurt at leska sær við, sera fryntlig starvsfólk og besta tænastan.



**Úr Billund til: Alicante, Amsterdam, Barcelona, Girona, Bergen, Berlin, Birmingham, Bruxelles, Dublin, Düsseldorf, Edinburgh, Frankfurt, Føroyar, Göteborg, Helsinki, London/Gatwick, London/Stansted, Madrid, Malaga, Manchester, Milano, München, Nice, Olbia, Oslo, Paris, Pisa, Prag, Reykjavik, Riga, Rom, Stavanger, Stockholm og Valencia.**

## Góð og bílig gisting

**Beint við flogvøllin liggur Zleep Hotel Billund. Hotellið er partur av vælumtóktu Zleep-røðini, sum bjóðar góða og bíliga gisting til teirra, sum ikki tíma at brúka pengarnar at sova fyri. Tí er øll óneyðug hotelútgerð skorin burtur, so sum fønari, telefon, matstova, baðikar og buksupressa – afturfyri fært tú eina góða song, parkering og tráðleyst Internetsamband í einum reinum umhvørvi beint við flogvøllin úr 250 kr. fyri náttina.**

**Atlantic Airways flýgur til Billund upp til 8 ferðir um vikuna.**

### Puntur nr. 23




